# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tað er harmiligt, at heiðursfólk sum Alberto Gonzales ikki fáa frið til at útinna sítt arbeiði*
*(George W. Bush, forseti).*

# AIDS-sjúklingar verða jarðaðir livandi

**Í Papua Ný Guinea vita fólk sær eingi ráð enn at jarða sínar AIDS-sjúku næstringar livandi**

- Eg havi sæð tey jarða trý fólk. Eingin var at taka sær av teimum, og tí bleiv avgjørt at jarða tey livandi, sigur Margeret Marabe við BBC.

Sjálv arbeiðir hon hjá einum hjálparfelagsskapi í Papua Ný Guinea, og tað er ikki bara hon, sum veit at siga frá slíkum søgum um tey AIDS-sjúku har. BBC-tíðindamaðurin Phil Mercer veit frá AIDS-sjúklingum, sum eru tveittir út av einari brúgv, og í øðrum førum liggja sjúklingarnir einsamallir í einum garði, til teir eina ferð svølta í hel, sigur hann.

Phil Mercer, sum starvast á BBC-tíðindastovuni í Sidaney, sigur, at tey AIDS-sjúku í Papua Ný Guinea verða jarðað, tí tey avvarðandi hava ikki umstøður til at taka sær av teimum, ella tí tey eru bangin fyri at verða smittað.




*Fólk hava ikki umstøður til at hava sínar AIDS-sjúku næstringar, og fleiri verða tí jarðaðir livandi*

**Duld tøl**

Papua Ný Guinea, sum er partur av Oseania í Kyrrahavinum, hevur stórar trupulleikar av AIDS. Alment siga myndugleikarnir, at tvey prosent av fólkinum ella umleið 120.000 fólk eru smittað, men hjálparfelagsskapir og onnur vilja vera við, at tað veruliga talið er nógv størri.

Heilsumálaráðharrin í Papua Ný Guinea, Nicholas Mann, sigur við BBC, at myndugleikarnir hava ilt við at kunna fólkið um vandan við HIV og AIDS, tí fólk tosa fleiri ymisk tungumál, og tí er tað torført at kunna fólkið, sigur hann.

# Kláraði ikki trýstið

**Alberto Gonzales leggur frá sær sum amerikanskur løgmálaráðharri**

-Tað er harmiligt, at vit liva í einari tíð, har heiðursfólk sum Gonzales ikki sleppa at útinna sítt týdningarmikla arbeiði.

Tað var viðmerkingin hjá George W. Bush, forseta, eftir at Alberto Gonzales hevði boðað frá, at hann hevur gjørt av at fara frá sum løgmálaráðharri tann 17. september.

Tann 52 ára gamli Alberto Gonzales hevur verið løgmálaráðharri síðani í februar í 2005, men hann hevur verið fyri hvøssum atfinningum, síðani átta almennir ákærar fingu sekkin. Í Kongressini hava demokratarnir og fleiri republikanarar funnist at avgerðini, sum teir søgdu vera politiska, og teir hava kravt løgmálaráðharran frá. Í gjár orkaði Gonzales ikki at standa ímóti trýstinum longur.

- Tað hevur verið mær ein stórur heiður at virka sum amerikanskur løgmálaráðharri, segði hann, tá hann kunnaði fjølmiðlarnar um avgerð sína.



*Alberto Gonzales var dómari í hægstarætti í Texas, til George W. Bush bað hann koma til Washington*

# Ovurfiti hóttir amerikanska búskapin

**Taka amerikanarar sær ikki um reiggj, fara 41 prosent av fólkinum at líða av ovurfiti um nøkur fá ár. Og tað fær avleiðingar**

Við at brúka ein serligan útrokningarhátt eru granskarar á John Hopkins University komnir til ta niðurstøðu, at fyri trimum árum síðani vigaðu 66 prosent av amerikanska fólkinum ov nógv, og hjá nógvum var talan um beinleiðis ovurfiti. Serliga illa stóð til hjá teimum svørtu kvinnunum, sum vóru farnar um tey 40, tí av teimum vóru heili 80 prosent ov tungar.

Granskararnir á John Hopkins University siga, at ovurfiti er einki minni enn ein bumba undir amerikanska heilsuverkinum, tí fólk, sum líða av ovurfiti, eru í munandi størri vanda fyri at fáa hjartasjúkur, sukursjúku og ávís sløg av krabbameini.



*Í 2015 fara 41 prosent av amerikanska fólkinum at líða av ovurfiti, og tað kann fáa álvarssamar avleiðingar*

- Ovurfiti verður ein hóttan ímóti búskapinum, verður einki gjørt, sigur granskarin May Bedoun, sum hevur verið við til at gera kanningina.

## STUTT SAGT

### Tað vóru kekenar

Í Russlandi heldur ákæruvaldið seg hava fingið vissu fyri, at tað var ein kekenskur felagsskapur, sum beindi fyri tíðindakvinnuna Anna Politkovskaya. Hon bleiv funnin skotin uttan fyri íbúð sína í Moskva fyri einum ári síðani. Høvuðsákærin, Jurij Tjajka, sigur við Itas-Tass, at maðurin, sum stóð á odda fyri drápsliðnum, er ættaður úr Kekenia, men býr í Moskva. Sambært ákæranum var tað helst hesin sami felagsskapurin, sum myrdi amerikanska tíðindamannin Paul Klebnikov fyri trimum árum síðani. Millum limirnar í felagsskapinum eru fyrrverandi og núverandi yvirmenn í trygdartænastuni FSB, skrivar Itar-Tass.

### Skal ansa oljuni

Myndugleikarnir í Saudiarabia eru farnir undir at manna eitt serligt herlið við 35.000 hermonnum, hvørs uppgáva verður at verja landsins stóra oljuútbúnað ímóti álopum frá yvirgangsmonnum. Tað skrivar bretska blaðið Financial Times. Sambært blaðnum hava myndugleikarnir gjørt av at brúka einar 25 mia. krónur til at manna herliðið og til øll nútímans vápn. Minst fýra ferðir hava yvirgangsmenn roynt at gera seg inn á oljuútbúnaðin í Saudiarabia, men álopini hava ikki gjørt stórvegis skaða.

### Royking bannað

Alt fleiri og fleiri danir nokta húsfólkinum og gestum at roykja inni, og sambært nýggjum hagtølum er royking fullkomiliga bannað í triðja hvørjum heimi í Danmark nú, sigur danska útvarpið. Inge Clemmesen, yvirlækni hjá Kræftens Bekæmpelse, sigur, at um nøkur heilt fá ár verður royking helst bannað í næstan hvørjum heimi í Danmark. Tey, sum selja hús, vita eisini at siga frá, at fleiri keyparar vilja ikki hava hús, um teir gomlu eigararnir hava roykt inni.